**10 TING** UM

# KAJ LEO JOHANNESEN

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



# Løgmaður við landsdystum

FØROYA **LØGMAÐUR** HEVUR SPÆLT Á FÓTBÓLTSLANDSLIÐNUM, OG HANN HEVUR EISINI ROYNT SEG SUM **SANGARA**

1 Kaj Leo er giftur við Jórun, og tey eiga tríggjar synir – Heini, Jákup og Jónas.

2 Kaj Leo er einsamallur drongur í einum systkinaflokki upp á fimm, ið eisini telur systrarnar Liss, Marin, Jákubinu og Oddvør.

3 **Hann er útbúgvin sum skipsførari.**

4 Í árunum frá 1997 til 2000 var hann býráðslimur í Tórshavnar kommunu.

5 Síðani 2002 hevur Kaj Leo Johannesen verið valdur sum løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin

6 **Í 2004 gjørdist hann landsstýrismaður, og tá bleiv hann eisini formaður fyri Sambandsflokkin.**

7 **Í september 2008 tók Kaj Leo við sum Føroya løgmaður, og tað starvið hevur hann røkt síðani.**

8 Kaj Leo var landskendur sum málmaður í HB, áðrenn hann gjørdist politikari.

9 Í árunum 1991 og 1992 spældi Kaj Leo fýra ferðir á føroyska fótbóltslandsliðnum.

10 **Kaj Leo hevur roynt seg sum sangari – tað gjørdi hann í fótbóltssangi saman við Jóannes Jakobsen.**

## SITAT



Droym sum um tú livir í allar ævir. Liv sum um tú doyrt í dag.

*James Dean*

**LAGT TIL RÆTTIS:** Inna Törnroos

## MIÐLARNIR OG EG

í nýggja táttinum siga kendir og ókendir persónar frá síni miðlanýtslu.



**SIGRUN LIÐJOENSEN** ÚR SØRVÁGI, LESUR UDE OG HJEMME, HYGGUR AT X FACTOR OG VIL HAVA MINNI SLATUR Í MIÐLUNUM.

**MÍTT BLAÐ - DAG OG VIKUBLAÐ**
Eg lesi Sosialin og vikublaðið Ude og Hjemme




**MÍN HEIMASÍÐA**
Portalurin, Vágaportalurun, EB, BT, H&M

**MÍN TÓNLEIKUR**
Ógvuliga blandað. Mær dámar væl Coldplay og Bon Jovi

**MÍTT SOSIALA NETVERK (TD FACEBOOK)**
Facebook og skype og so mín bindiklubba, sum eg ikki kann vera fyriuttan

**MÍN DVD**
PS I Love You

**MÍTT MAGASIN**
Kvinna



**MÍN SJÓNVARPSRØÐ**
Greys hvide verden, Ghostvhisperer og X Factor

**MÍTT ÚTVARP**
Fyri tað mesta Rás 2, men Kringvarpið í døgurðatímanum og kl 18.

**MÍN TELEFON**
Ein Samsung, sum mest verður brúkt at senda sms við. Havi hana altíð uppi á mær



**MÍN BÓK**
Minnist onga bók í løtuni, bara kókibøkur

**HVAT VIL TÚ IKKI BRÚKA MIÐLATÍÐ UPPÁ?**
Meiningsleyst slatur og gitingar

**HVAT IRRITERAR TEG Í MIÐLUNUM?**
Tá tað handlar ov nógv um, at onkur kendur á ein ella annan hátt hevur traðka við síðurnar av. Eg kundi ikki lagt minnið í, um onkur er ótrúgvur, er í býnum í ongum trussum ella hevur drukkið ov nógv. Ella hvat tað nú kundi verið ...

**HVAT VIL TÚ HAVA MEIRI AV Í MIÐLUNUM?**
Góð tíðindir, positivar søgur/hendingar og okkurt stuttligt